# SUMBIAR KOMMUNA

## STÝRISGERÐABÓK 2019

## 23/08-2019-06

| | |
|---|---|
| **Fundur nr. 06**<br>Tíð: **23.august 2019, kl. 21:00**<br>Stað: **Kommunuskrivstovan** | Notis: |
| **14.01.19 – 22.02.19 – 25.03.19 – 03.05.19 – 03.06.19 – 12.07.19 – 26.08.19 – 23.09.19 – 21.10.19 – 05.11.19 – 29.11.19 – 30.12.19.** | Møttir:<br>Eyðbjørn Thomsen<br>Brynleif Bech<br>Niclas Hentze<br>Rúni Lisberg<br>Frits Poulsen |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 01/06**<br>• **Umsókn um broyting av bátadráttinum í Lopra.** | • **Samtykt var at taka undir við at fáa dráttin stoyptan longur út.** |
| **Mál nr. 02/06**<br>• **Umsókn um bátapláss í Lopra.** | • **Samtykt var at geva loyvið til bátapláss, men sum nú er, er einki pláss við brúgvarnar, kommunan vendir aftur til umsøkjarar tá pláss eru tøk.** |
| **Mál nr. 03/06**<br>• **Umsókn um stuðul til seyðasýningina.** | • **Samtykt at stuðla við 7.000,- kr.** |
| **Mál nr. 04/06**<br>• **Stuðuls umsókn í samband við rudda Føroyar.** | • **Sumbiar kommuna hevur árligan ruddingardag. Ì samband við Rudda Føroyar, vil kommunan heinta burturkastið frá hesum tiltakið uttan kostnað. Sumbiar kommuna lýsir við hesum "Rudda Føroyar" á heimasíðuni.** |
| **Mál nr. 05/06**<br>• **Tilboð frá VAKA.** | • **Samtykt var, at biðja báðar fyritøkurnar, sum hava hesa tænastu í Suðuroy um ein prís fyri fastar túrar um vikuna/dagin.** |
| **Mál nr. 06/06**<br>• **Umsókn um byggiloyvið til matr. nr. 226.**<br>• **Umsókn um byggiloyvið til matr. nr. 29d.** | • **Umsøkjarin verður biðin um at koma við eini fullfíggjari tekning, har mátini standa á, og eitt nú avstandur til nærmasta matrikul/granna.**<br>• **Kunna var um hesa beklæðingina /liðugt gerð.**<br>• |
| **Mál nr. 07/06**<br>• **Umsókn um stuðul til eldradagar.** | • **Samtykt at stuðla við 3.000 kr.** |
| **Mál nr. 08/06**<br>• **Lántøka 2. viðgerð** | • **Samtykt við 2.viðgerð.** |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 09/06**<br>• **Closed for maintenance.** | • **Sumbiar kommuna er áhuga í hesum saman við Vágskommunu. Mailur frá Vágs kommunu (Dennis Holm) 23.08.2019. Sumbiar kommuna fer í samráðingar við Lopranshaga, og Vágs kommuna tosar við eigararnar í Lopransholmi.** |
| **Mál nr. 10/06**<br>• **Setan av arbeiðsfólkið.** | • **Einmælt samtykt var at seta Jákup J Joensen.** |
| **Mál nr. 11/06**<br>• **Dagrøktin.** | • **Samtykt var at søkja eftir leiðara til dagrøktina ½ tíð, galdandi frá 01.01.2020.** |
| **Til støðutakan / kunning.**<br>1. **Skattainntøkurnar 2019.**<br>2. **Matr. nr. 131c, mál frá seinasta fundi.**<br>3. **Kunning viðvíkjandi matr. nr. 98c.**<br>4. **Vatnleiðing.**<br>5. **Sólorkuskipanin.**<br>6. **Alment vc á spæliplássinum.**<br>7. **Leigan av lastbilinum hjá Sumbiar kommunu.**<br>8. **Ymiskt.** | 1. **Kunna var um skattainntøkurnar.**<br>2. **Sumbiar kommuna er møguliga sinna, at seta pening av á eini komandi fíggjarætlan til keyp av hesum grundstykkið.**<br>3. **Kunna var um, hvør hevur keypt hettar grundstykkið.**<br>4. **Kunna var um grift í Lopra, samtykt var, at legga rør í griftina, og at tyrva aftur. Ìbindingin verður gjørd komandi ár. Leiðingin í Víkarbyrgi kann leggjast av nýggjum komandi ár. Kanna prísin á slangu, frá keldu undir eggini (Skálanum) og eystur í Akraberg, ca 1500m.**<br>5. **Taka undir við uppskotinum frá SEV um leigusáttmála, mailur dagf. 22.08.2019 frá Eirikur Norðberg.**<br>6. **Samtykt var at leggja rør klár til eitt alment wc við spæliplássið í Sumba.**<br>7. **Samtykt var, at lastbilurin og maskinan ikki verða leigaði út í arbeiðstíðini,um hesu eru í brúk, og sama er galdandi fyri arbeiðsfólkið hjá kommununi. Maskinan og bilurin kunna tó verða leiga út, til royndan førara, um tey ikki er í brúk. Leigan fyri bilin er 500kr/tíma. Leigan fyri maskinina er enn 300kr/tíma** |
| | |

SUMBIAR SÓKNAR KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 24.00

Eyðbjørn Thomsen Frits Poulsen

Rúni Lisberg Brynleif Bech Niclas Hentze

SUMBIAR SÓKNAR KOMMUNA